## Sparing er skeivur kreppupolitikkur

Jóannes Jacobsen, búskaparfrøðingur, sigur eins og Hermann Oskarsson, at lønarsteðgur er ikki tað rætta í krepputíð. -Sparing er ikki tann rætti kreppupolitikkurin. Vit klára saktans at hava eina milliard í halli á fíggjarlógini um árið í tvey ár og at læna báðar milliardirnar til undirskotið. Tað sigur búskaparfrøðingurin Jóannes Jacobsen við útvarpið hjá Kringvarpinum. Hann ávarar eisini ímóti ætlanini hjá landsstýrinum at fáa fakfeløgini at ganga við til at strika lønarhækkingina í heyst. -Tað er grundleggjandi búskaparfrøði, at lønarsteðgur er heilt burturvið í einari konjunkturkreppu, sigur Jóannes Jacobsen, sum er fyrrverandi skrivari hjá Búskaparráðnum. Hann hevur skrivað eina phd-ritgerð í buskaparfrøði, sum hann skal verja í næsta mánað.



## Nú skal soppurin burtur

Vága Kommuna er farin undir at høvuðsumvæla og nútímansgera alla niðastu hædd í gamla skúlabygninginum Miðvágs- Sandavágs skúla, skúlanum á Giljanesi. Soppavøkstur varð staðfestur har í vár. Talan er um skúlastovu og serhøli frá høvuðsinngongdini og heilt inn í eystara enda á bygninginum. Gólv og veggir verða skift út, eins og undirlagið verður gjørt heilt av nýggjum. Økið kring sjálvan skúlabygningin er fyri stuttum grivið upp og drenað av nýggjum. Soppavøkstur varð staðfestur í bygninginum í eini kanning, sum gjørd varð í apríl í ár, og hetta hevur virkað við til at framskunda umvælingina.

# Ferðasambandið til Suðuroyar skerjast

**Í kreppupakkanum hjá samgonguni er lagt upp til, at siglingin hjá Smyrli ímillum Suðuroy og Havnina, skal skerjast**

KREPPUPAKKI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Næsta ár skulu suðuroyingar hava verri ferðasamband enn teir hava í ár.

Tað er ein møguleiki, sum er nevndur í ætlaða kreppupakkanum hjá samgonguni fyri at spara pengar.

Bæði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður í fíggjarmálum, og Kaj Leo Johannesen, løgmaður, hava áður boðað frá, at øll fíggjarlógin sum hon er, skal gjøgnumgangast fyri at finna sparingar.

Og keldur hjá Sosialinum, sum hava verið á fundi í fíggjarmálaráðnum og fingið frágreiðing um kreppupakkan, fortelja, at samgongan hevur enntá sett kikaran á ferðaætlanina hjá Strandferðsluni fyri at vit um tað ikki ber til at finna sparingar har eisini.

### Missa ein túr

Og í hesum sambandi er eitt uppskot hjá samgonguni at strika ein túr hjá Smyrli ímillum Suðuroy og Havnina mikudag, fyri at finna sparingar.

Smyril hevur í nógv ár siglt tveir túrar um dagin ímillum Suðuroy og Havnina, men nakað síðani játtaði Løgtingið Strandferðsluni eyka pengar, so at Smyril kundi sigla tríggjar túrar afturat um vikuna.




*Heldur ikki ferðasambandið ímillum Suðuroy og Havnina sleppur snikkaleyst undan sparikníivinum hjá samgonguni. Tað liggur í kortunum, at samgongan ætlar at spara smáar tvær milliónir við at strika ein túr hjá Smyrli um vikuna*

Sostatt varð ferðaætlanin víðkað, so at Smyril nú í eina tíð hevur siglt tríggjar ferðir ímillum mánadag og mikudag og so er ein eyka túrur um vikuskiftið.

Men nú sær altso út til, at Smyril missur eykatúrin mikudag.

Strandferðslan upplýsir, at skuldi tað hent, at ein túrur hjá Smyrli verður strikaður, fer tað at føra til eina sparing upp á onkustaðni ímillum 1,7 og 2 milliónir.

Tað allarmesta av hesum er olja, tí Strandferðslan ivast í um tað ber til at spara nakað í manningarútreiðslum, hóast ein túrur verður tikin burtur úr ferðaætlanini

Uttan at hava kannað tað út í æsir, sigur Bogi Mortensen, stjóri á Strandferðsluni, at skal ein túrur hjá Smyrli strikast, kann tað tykjast sum um at mikudagur er frægasti dagur at gera tað í, tí tá siglur hann tríggjar ferðir.

Smyril siglur eisini tríggjar ferðir mánadag, men tá er heilt nógvur flutningur, serliga av farmi, sum kemur uttanlands um vikuskiftið.

Annars heldur stjórin, at verður játtanin til Strandferðsluna skerd, so at ein túrur skal strikast, má tað umhugsast gjølliga hvør túrurin skal vera og tað má gerast í samráð við skiparan og má byggjast á hagtøl fyri ferðafólk og farm, sum eru við teir ymsu túrarnar.

### Ógvuliga óheppið

Kristin Michelsen, borgarstjóri á Tvøroyri, heldur, at tað er stak óheppið at samgongan fer at nápa burtur av túratalinum hjá Smyrli.

- Túrarnir mitt á degi mánadag og mikudag hava verið ómetaliga hentir, serliga hjá suðuroyingum, ið fara stutt ørindi til Havnar og hjá fólki norðaneftir, sum hava ørindi í Suðuroy.

Hann sigur tískil, at tað verður ikki uttan mótstøðu, at samgongan sleppur at skerja túratalið hjá Smyrli og at hann nú fer at taka stig til at kalla borgarstjórarnar í oynni á fund at viðgera málið.

# Leita eftir hølum í Suðuroy til eftirskúla

**Borgarstjórarnir í Suðuroy ásanna nú, at samgongan er ikki sinnað at byggja ætlaða eftirskúlan í Hvalba og tí verður kannað eftir um onnur høli eru, sum kunnu brúkast**

EFTIRSKÚLI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Borgarstjórarnir í Suðuroy berjast av øllum alvi fyri at ætlaði eftirskúlin í Suðuroy verður til veruleika.

Og nú fara teir at kanna eftir um ikki hóskandi høli eru í oynni at húsa skúlanum í.

Higartil hevur verið tosað um at byggja ein eftirskúla í Hvalba, men sannlíkindini fyri tí minka alsamt.

Og nú hava borgarstjórarnir í Suðuroy ásannað, at skal tað eydnast fáa ein eftirskúla í Suðuroy, verða teir helst noyddir at sleppa kravinum um at hann skal vera í Hvalba.

Annars hava teir higartil hildið fast um, at skúlin skuldi vera í Hvalba. Hinvegin hevur landsstýriskvinnan í mentamálum, Helena Dam á Neystabø, boðað púra greitt frá, at tað er ov dýrt.

Hon heldur, at skal eftirskúlin í Suðuroy hava nakran møguleika, verður neyðugt at finna eina bíligari loysn og at finna innivist fyri skúlanum í onkrum høli, sum eru í oynni frammanundan.

Tí heldur hon, at ein hóskandi bygningur skal finnast onkustaðni í oynni og so skal næmingaheim byggjast í tilknýti til tann bygningin.

Sjálv heldur hon, at skúlin í Sumba er sera væl hóskandi til eftirskúla.

### Borgarstjórar standa saman

Støðan, sum eftirskúlin er komin í, fekk allar sjey borgarstjórarnar í Suðuroy at hittast um vikuskiftið at viðgera málið.

Úrslitið av fundinum er, at teir hava sent landsstýriskvinnuni í mentamálum eina felags niðurstøðu, har teir framvegis halda, at besta loysnin er at byggja eftirskúlan í Hvalba.

Hinvegin staðfesta teir, at landsstýriskvinnan tekur ikki undir við at byggja ætlaða skúlan í Hvalba.

Hinvegin siga borgarstjórarnir í Suðuroy, at tað ógvuliga umráðandi fyri teir at staðfesta, at teir standa saman um eftirskúlan, sama hvar í oynni hann verður.

Fyri ikki at missa eftirskúlan av oynni, eru allir borgarstjórarnir í Suðuroy samdir um, at nú fara teir hvør í sínum lagi at kanna eftir um teir finna onkur høli, sum kunnu hugsast at vera hóskandi til at húsa einum eftirskúla.

- Vit halda, at hetta er eitt ógvuliga álvarsligt mál og at farast skal skynsamt fram fyri at finna best hugsandi loysnina, siga teir sjey borgarstjórarnir í fráboðan til landsstýriskvinnuna í mentamálum.

Teir eru eisini samdir um, at tá ið tær sjey kommunurnar hava havt høvi til at bjóða seg fram, verða teir ymsu møguleikarnir lagdir fyri eftirskúlanevndina, sum so skal meta um, antin nøkur av hølunum, sum eru til taks, eru hóskandi til ein eftirskúla, tí tað verður hon, sum eigur endaligu avgerðina.